# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Eingin ivi í umróðrinum

**Tað var so tætt sum tað kundi vera, men eisini so ivaleyst sum til bar. Heiðabáturin vann tryggan sigur í umróðrinum ímóti Árnfirðingi**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Fleiri umborð á Heiðabátinum vóru við at manna Sølmund í fjør, og higani hava teir royndir við umróðrum. Tað hjálpti á ólavsøku*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

| **Ólavsøkutíðin:** |
| --- |
| 1 Heiðabáturin 04:07.12 |
| 2 Árnfirðingur 04:07.13 |
| 3 Argjabáturin 04:10.09 |
| 4 Kvívíkingur 04:16.09 |
| 5 Knørrur 04:24.17 |

| **Støðan:** |
| --- |
| 1 Heiðabáturin (FM) 49 |
| 2 Árnfirðingur 39 |
| 3 Argjabáturin 38 |
| 4 Kvívíkingur 28 |
| 5 Knørrur 12 |
| 6 Miðvingur 3 |

Í umróðrinum millum 8-mannaførini var eingin ivi. Heiðabáturin stevndi einsamallur á mál, og tað gekk rúmtíð, áðrenn Árnfirðingur var komin fram. Einar tvær, um ikki tríggjar bátslongdir vóru á muni. Í fyrra róðrinum fóru Heiðabáturin og Árnfirðingurin annars stavn um stavn á mál. Tí var neyðugt við umróðri.

– Vit hildu, at vit høvdu eina hálva bátslongd at geva av, men so tagdi róðursmaður okkara, og tá hevur tað verið ógvuliga javnt, metti Bjarki Danielsen, sum rør við Heiðabátinum. Men hóast javnt í fyrstu royndini, stúrdu teir í gula bátinum ongantíð, tá rógvast skuldi umaftur.

– Á longru teinum hava vit sæð, at vit orka nógv betri og á 1500 metra teinunum eru vit eisini tað frammanfyri Árnfirðing. Tí ivaðust vit ongantíð, tá tað bleiv til umróður, greiddi Bjarki Danielsen frá.

Tað var heldur eingin ivi, tá samlaða støðan í 8-mannaførum skuldi gerast upp. Heiðabáturin var greiður vinnari við 49 stigum, tíggju stig aftur til nummar tvey.

# Havnarbáturin setti Ormin upp á pláss

**Kappingin var intens, men hon gjørdist ikki so tøtt, sum tað kanska varð roknað við. – FM skuldu vit vinna, og at vit so fingu ólavsøkusigurin eisini er fantastiskt, segði Brandur Pætursson á Havnarbátinum**

KAPPRÓÐUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Hetta var trettanda FM heitið hjá Havnarbátinum, sum framvegis er mest vinnandi róðrarbáturin, síðani tað í 1973 varð farið undir at kappast um FM á tann hátt, sum tað framvegis verður gjørt*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

| **Ólavsøkutíðin:** |
| --- |
| 1 Havnarbáturin 04:00.04 |
| 2 Ormurin 04:03.01 |
| 3 Eysturoyingur 04:12.08 |
| 4 Nólsoyingurin 04:20.22 |

| **Støðan:** |
| --- |
| 1 Havnarbáturin (FM) 46 |
| 2 Ormurin 45 |
| 3 Nólsoyingurin 21 |
| 4 Eysturoyingur 15 |
| 5 Ormurin Langi (VK) |
| 6 Vestmenningur 3 |

Tað var eingin ivi, tá ið spennandi kappingin millum 10-mannaførini skuldi avgerast í mjørkanum á Havnarvág.

Havnarbáturin hevði betri start enn Ormurin, og Havnarbáturin smurdi Ormin av.

Á málinum var munurin ein bátslongd.

Úrslitið ber við sær, at Havnarbáturin vann FM 2008. Hetta var trettanda FM heitið hjá Havnarbátinum, sum framvegis er mestvinnandiróðrarbáturin, síðani tað í 1973 varð farið undir at kappast um FM á tann hátt, sum tað framvegis verður gjørt. – Hetta var fantastiskt. Vit fingu ein heldur slakan start, men komu so aftur og bara øktu, og í síðsta enda høvdu teir ongan kjans, segði Brandur Pætursson á Havnarbátinum. Hann lýsti annars munin millum Havnarbátinum og Ormin soleiðis, at teir hvítu úr Havnini høvdu "timað" kappingarárið betri, sum hann tók til.

– Og FM skuldu vit vinna, og at vit so fingu ólavsøkusigurin eisini er fantastiskt, segði Brandur Pætursson.

Úrslitið á ólavsøku ber eisini við sær, at tað ikki eydnaðist Orminum at vinna FM heitið í fyrstu kappingini nakrantíð. Teir fingu silvur.

Harvið verður setningurin hjá teimum í Róðrarfelagnum Knørri næsta ár at bjóða nýklæktu FM vinnarunum í Havnarbátinum av í 2009, tá ið tað ljóðar frá, at aðrir bátar eisini fara at bjóða seg fram.